# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Stjørnan byrjar í Vági

**Endurtøka av FM-finaluni er á skránni alt fyri eitt hjá kvinnunum, tá farið verður undir hondbóltslandskappingina seinast í hesum mánaðinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Meistararnir úr Stjørnuni byrja kappingarárið á útivølli móti VB, sum í fjør var hin parturin í finaludystunum*

*Savnsmynd*

Í gjár kundi Hondbóltssambandið geva feløgunum kring landið boð um, hvussu spælast skal í hondbóltslandskappingini í vetur.

Fyrstu dystirnir verða spældir leygardagin tann 29. september, og lagt er upp til satt brak longu fyrsta dystin. Meistararnir úr Stjørnuni byrja nevnliga við útidysti móti VB, sum eisini var mótstøðuliðið í finaludystunum í fjør. Í mun til hini liðini, so hevur Stjørnan í summar fyrireikað seg til europiskar avbjóðingar, og so verður spennandi at síggja, hvussu stóran fyrimun hetta hevur givið í venjingarstøðuni.

Fyrstu umførini síggjast aðra staðni her á síðuni, og seinast mars mánaði fáa vit at vita, hvørji lið verða føroyameistarar í hondbólti 2007/2008. Fyrstu finaludystirnir verða spældir 24. mars, og verður talan um tríggjar finalur, verður tann seinasta av hesum spæld tann 30. mars.

**Fyrstu umførini**

**Sunset-kappingin**

| Dagur | Kl. | Dystur |
|---|---|---|
| 29-09-07 | 14.30 | Neistin - VÍF |
| 29-09-07 | 14.30 | StÍF - Kyndil |
| 29-09-07 | 15.00 | VB - Stjørnan |
| 02-10-07 | 19.00 | Stjørnan - StÍF |
| 06-10-07 | 14.30 | Kyndil - Neistin |
| 06-10-07 | 14.30 | VÍF - VB |
| 14-10-07 | 14.30 | Neistin - Stjørnan |
| 14-10-07 | 14.30 | VÍF - Kyndil |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 29-09-07 | 16.00 | Neistin - VÍF |
| 29-09-07 | 16.00 | KÍF - H71 |
| 29-09-07 | 16.00 | StÍF - Kyndil |
| 06-10-07 | 16.00 | Kyndil - Neistin |
| 06-10-07 | 16.00 | H71 - StÍF |
| 06-10-07 | 16.00 | VÍF - KÍF |
| 14-10-07 | 16.00 | Neistin - H71 |
| 14-10-07 | 16.00 | StÍF - KÍF |
| 14-10-07 | 16.00 | VÍF - Kyndil |

# VB-venjarin ikki viðgjørdur enn

**Enn er Aganevndin hjá FSF ikki komin við nøkrum úrskurði, hvørt »nevaleikur« í Vági skal fáa avleiðingar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í morgin verður júst ein mánaður, síðani EB/Streymur vann 2-1 á VB/Sumba í útidystinum. Meira enn tepri sigurin hjá gestunum so verður dysturin helst mintur fyri hendingina, tá EB/Streymur í yvirtíðini skoraði sigursmálið.

Hendingin, har VB-venjarin leyp inn á vøllin og langaði til Hans Paula Samuelsen varð víst á sjónvarpsskíggjanum mánakvøldið eftir dystin, og seinni heitti starvsnevndin hjá FSF á Aganevndina um at taka málið upp til viðgerðar.

Sambært skrivstovuni hjá FSF, so eru enn eingi boð komin úr Aganevndini um nakran úrskurð. VB/Sumba boðaði eftir fáum døgum frá, at felagið hevur sektað venjaran, men einki varð sagt um, hvørja revsing talan var um. Talan hevur tó ikki verið um dystarbann av nøkrum slag, tí í dystunum, sum VB/Sumba hevur spælt síðani, hevur Predrag Prsic framvegis verið á beinkinum.



*Enn er eingin úrskurður gjørdur í málinum um venjaran hjá VB/Sumba. Í morgin er ein mánaður liðin, síðani tilburðurin fór fram*

*Skíggjamynd frá SvF*